# Nýggja vatnverkið ein fyrimynd

**Umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna letur væl at nýggja vatnverkinum í Rituvík. Hann metir skipanina í Runavíkar Kommunu vera eitt fyridømi, sum onnur kunnnu fylgja. Eisini ásannar hann, at umstøðurnar ikki eru nóg góðar í ávísum økjum í landinum**

NÝTT VATNVERK
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Bárður Enni, stjóri í Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, var á kannaði umstøðurnar, tá ið nýggja vatnverkið í Rituvík varð tikið í nýtslu í gjár. - Skipanin er ein fyrimynd fyri onnur, sigur hann*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*

Eitt umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Bárður Enni, varð bjóðaður til Rituvíkar, tá ið vatnverkið varð tikið í nýtslu. Hann fekk møguleika at síggja umstøðurnar í Rituvík, og niðurstøðan hjá honum má sigast at vera positiv:

### Fyrimynd

- Tað fyrsta tú leggur til merkis, tá tú kemur til økið, er hvussu væl alt er frágingið. Økið er innistikað, fysisku karmar kunnu ikki vera betri og tekniski útbúnaðurin er tað, sum í dag kann væntast av einum nútímans vatnverki. Við at lúka krøvini, sum verða sett til eitt matvøruvirki, sum eitt vatnverk í veruleikanum er, hevur Runavíkar kommuna avgjørt fatur í tí rætta endanum, og er hetta vit síggja í Rituvík avgjørt ein fyrimynd, sum onnur í líknandi støðu kunnu læra nógv av.

- Eg skilji, at tey eisini hava kannað góðskuna á drekkivatninum í Rituvík, bæði mikrobiologiskt og kemiskt. Gjørdu kanningarnar vísa, at drekkivatnið lýkur ásett krøv, sigur Bárður.

Hóast Bárður Enni fegnast um góðu skipanina í Runavík, so ásannar hann, at umstøðurnar ikki eru so góðar allastaðni í landinum:

- Í ár hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan vitjað allar kommunur í landinum, fyri at staðfesta viðurskiftini rundanum vatnverk og vatnveiting. Ásannast má, at umstøðurnar eru sera ymiskar runt um í landinum. 80 % av borgarunum í landinum fáa reinsað vatn. Íalt eru tað 118 vatnveitingar, harav einans 39 veita reinsað vatn. Tær vatnveitingar, sum veita óreinsað vatn, eru serliga á teimum smærru bygdunum, men eisini onkur stór bygd/býur eru millum økini, sum fáa óreinsað vatn frá vatnveitingini.

### ES ásetingar

Hann vísir á, at krøvini til drekkivatn eru strang, tí at tað er at meta sum matvøra. Krøvini, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan setir, eru í tráð við ES ásetingarnar.

- Alt arbeiðið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni verður gjørt við heimild í matvørulógini, sum jú ásetur, at drekkivatn er at meta sum ein matvøra. Við støði í hesum royndum, er tað gjørt uppskot til kunngerð um rakstur av vatnverkum. Kunngerðin tekur eisini støði í ES ásetingum. Æltanin er, at kunngerðin skal verða karmurin um arbeiðið hjá teimum, sum reka vatnverk og grundarlagið undir arbeiðið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sigur Bárður Enni at enda.

Rodmundur Nielsen:

# - Eg havi elskað starvið

**Í gjár var síðsti starvsdagur hjá Rodmundi Nielsen sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu. Síðsta almenna uppgávan hjá honum var móttøkan í Rituvík í gjár, tá ið nýggja vatnverkið varð tikið í nýtslu. Sosialurin fekk orðið á fyrrverandi borgarstjóran**

FRÁFARIN BORGARSTJÓRI
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Rodmundur Nielsen er júst farin frá sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu. Hann er glaður fyri tíðina og hevur einans góð minnir*

Rodmundur Nielsen segði nøkur orð á móttøkuni í gjár. Nógv nýttu høvið at heilsa honum og takka honum fyri hansara íkast tey síðstu árini sum borgarstjóri í Runavíkar Kommunu.

Rodmundur fegnast um nýggja vatnverkið í Rituvík, sum hann metir var tiltrongt.

- Vatnið í Rituvík er karrátt kelduvatn, og tað hevur verið okkara ringa samvitska í nógv ár, so tað var gott at fáa tað í rætt lag síðsta dagin hjá mær, sigur Rodmundur smílandi.

- Summi vilja kanska vera við, at vit hava bíðað ov langa tíð eftir nýggja vatnverkinum, men okkara politikkur hevur altíð verið at gjørt tað ordiligt, tá ið vit fara í holt við nakað. Vit ynskja ikki at hava eina lappaloysn, sum ikki er nóg góð. Seinastu árini hava vit sett 2 milliónir av hvørt ár til íløgur, sum skulu betra um drekkivatnið.

### Framkomin stýriskipan

Rodmundur vísir á, at við nýggju stýriskipanini hjá kommununi, eru íbúgvararnir tryggjaðir bestu umstøður, tá ið tað ræður um drekkivatn:

- Alt er teldustýrt frá einum sentrali í Runavík. Soleiðis kunnu vit síggja øll hagtøl heilt frá Skálafirði til Rituvíkar í telduskipanini, og tað er ein stórur fyrimunur.

- Menningin má halda áfram, og vit fara framvegis at arbeiða við at fáa bestu umstøður, so at drekkivatnið lýkur tey krøv, sum verða sett. Æðuvík, Elduvík, Funningsfjørður og Oyndarfjørður mangla enn at koma í skipanina, men vónandi verður hetta gjørt í nærmastu framtíð.

Rodmundur Nielsen er væl nøgdur við arbeiðið. El-Teknik í Leirvík hevur staðið fyri tí teldustýrdu skipanini, og sambært Rodmund er skipanin tann mest framkomna í landinum.

### Blandaðar kenslur

Mitt í gleðini yvir nýggja vatnverkið, merkir Rodmundur eisini eitt ávíst sorgblídni um at fara frá sum borgarstjóri.

- Tað passar ikki saman at vera so virkin innan vinnulív, sum eg eri, og eisini at vera borgarstjóri. Eg havi elskað starvið, og eg havi einans góð minnir frá tíðini. Tað hevur verið eitt gott politiskt stev, har ið øll hava drigið somu línu.

- Eg minnist bara góðar løtur. Eg haldi ikki, at eg havi upplivað nakað keðiligt, so tað er sjálvandi ringt at fara frá einum so góðum starvið, sigur Rodmundur.

Rodmundur fer sjálvandi framhaldandi at vera við í politiska arbeiðinum í býráðnum. Nýggi borgarstjórin er Hans Jacob lamhauge.

- Eg og Hans Jacob eru sera ymiskir sum persónar, og tí verður tað sjálvandi ikki sami borgarstjóri. Sum sagt hava vit øll hava eitt gott felags stev, og tað vóni eg fer at halda fram við nýggja borgarstjóranum. Eg ynski honum alt tað besta.

### Samanleggingarborgarstjóri

Rodmundur verður kanska best mintur sum "samanleggingarborgarstjórin". Í hansara tíð er kommunan vaksin nógv, og hann mettir sjálvur, at kommunan verður enn størri.

- Samanleggingarnar hava gingið væl. Sjálvandi er tað altíð okkurt, tú kundi havt gjørt øðrvísi, men eg angri einki. Tað hevur verið ein spennandi tilgongd, og Runavíkar Kommuna stendur frammanfyri einari stórari menning.

- Runavíkar Kommuna er altíð opin fyri samanlegging, og um áhugin gongur báðar vegir, er møguleikin heilt vist til staðar. Sæð yvir longri tíð, meti eg tað vera upplagt, at Eysturoyggin verður ein kommuna, sigur Rodmundur.

### Gleðir seg til at sleppa ígongd

Rodmundur Nielsen fer nú burturav at starvast sum stjóri í sínum fyritøkum.

- Eg gleði meg til at sleppa ígongd. Nú fari eg ein túr til Íslands at kobla av, men hósdagin klokkan 13 fari eg til arbeiðis.

Árini sum borgarstjóri hevur givið Rodmundi nakrar royndir, sum koma honum til góðar í vinnulívinum.

- Eg havi skapað mær eitt netverk og nakrar kontaktir. Hetta kann koma til góða, tá ið okkara vegir aftur krossast, og vit kenna hvønn annan frammanundan. Eisini hava eg starvast í 10 ár sum stjóri í Statoil, so eg eri ikki óroyndur.

- Tað er stuttligt at gera mun, og nú fari eg at leggja alla mína orku í vinnulívið. Eg fari at leggja meg í selarnar og gera mítt besta.



**Jákup Tróndheim er stjóri í fyritøkuni El-Teknik, sum hevur gjørt teldustýrdu stýrisskipanina til vatnverkini.**

- Vit hava fingið útgerðina frá samstarvsfeløgum uttanlands. Hetta er standardútgerð, sum verður nýtt til stýring av øllum møguligum. Vit hava programerað og sett skipanina upp, sigur Jákup.

Tað eru longu onnur, sum hava víst áhuga fyri stýrisskipanini.

- Tað eru nakrar kommunur, sum eisini hava víst áhugað. Annars fáast við nógv el-stýring innan millum annað alivinnu, sigur Jákup Tróndheim.

8 fólk starvast hjá El-Teknik.